Kyndil-StÍF 29-22 (13-9):

# Kyndil í føðingardagshýri

**Hóast árini av álvara nærkast teimum hálvthundrað, so spruttar Kyndil av ungdómi og spæligleði. Avrikið sunnudagin taldist millum tey bestu á árinum, og við sigrinum mest sum vissaði Kyndil sær pláss í finaluni**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ferð eftir ferð hevur StÍF prógvað, at tá teir standa við rygginum móti múrinum, eru fá lið í landinum, sum megna at standa teimum kurl.

Í so máta mundi teir hjá Kyndli vita av, at talan var um alt annað enn lætta uppgávu, tá teir sunnudagin tóku móti StÍF. Ein dystur, sum nærum pr. definitión er bæði tættur og undirhaldandi. Og hesa ferð eisini ein dystur, sum fyri Kyndil kundi at kalla staðfesta finaluluttøkuna, sum helst skal vera seinasta punktumið í runda árinum.

### Stórspæl

Størsti trupulleikin hjá Kyndli í ár hevur ofta verið stóru sveiggini í avrikunum. Tá liðið spælir upp til sítt besta, eru helst eingi lið í landinum, sum standa teimum kurl. Men hinvegin hevur pílurin eisini peiggjað niður eftir fleiri ferðir, við kostnaðarmiklum stigamissum sum fylgju.

Sunnudagin var tó eingin ivi. Frá fyrsta bríksli settu kyndilsmenn seg á dystin. Álopini skolaðu við fullari ferð, og ikki minst eydnaðist til fulnar at spæla tunt, áðrenn vengrirnir endaðu álopini. Serstakliga lá væl fyri at skora av vinstra veingi, meðan Høgni Klein og Rókur Akralíð eisini vóru støðugar hóttanir mitt fyri.

Strandingar, sum eisini vóru nakað skerdir, tí Alexandur Johansen nóg illa fekk tikið lut í dystinum, tóktust ongan tíð av álvara at fáa fatur í dystinum. Bæði tí grøna verjan gjørdi sítt arbeiði – men ikki minst, tí Kyndil í málinum hevur Lars Black. Ein spælari, sum helst kandiderar til heitini sum bæði ársins málverji og ársins stjørnuskot. Serstakliga var leiklutur hansara týdningarmikil, tá StÍF móti endanum av fyrra hálvleiki royndi at seta ferð. Júst í mest týðandi løtuni togaði hann tá tvær týðandi bjargingar fram, soleiðis at munurin varð hildin til hálvleiks.



*Marius Joensen spælir í ár við Kyndli, og hann var ein av motorunum, sum syrgdu fyri trygga sigrinum á fyrrverandi liðfeløgum hansara*

*Mynd: Álvur*

### Sveinur ov einsamallur

Og eftir steðgin var eingin ivi. Kyndil skoraði fyrstu fimm málini, og so var alt at kalla avgjørt. Sjálvandi kundi talan verið um okkurt katastrofalt kollaps, sum hevði loyvt strandingum aftur í dystin, men Kyndil var als ikki sinnað at geva nakra føðingardagsgávu. Við stabilum spæli hildu teir alla tíðina fast, og fagnaðurin á áskoðaraplássunum tóktist bara vaksa fyri hvørt málið, sum varð sent inn handan Marian Cirloganescu.

Hjá StÍF var at kalla bert Sveinur Justinussen, sum royndi at muta ímóti. Skothóttanirnar frá honum vóru eisini støðugar, men fleiri ferðir eydnaðist tó sterku miðverjuni hjá Kyndli at blokka skotroyndirnar. Og tá hóttanir ikki komu aðra staðni frá, megnaðu gestirnir av álvara at hótta sigurin.

### Finalurómur

Avrikið sunnudagin mest sum bílegði Kyndli eitt pláss í FM-finaluni. Enn er matematiska vissan ikki til staðar, men megna teir grønu at basa KÍF mikudagin, so er leyst og liðugt. Og verður hugt at hagtølunum millum júst KÍF og Kyndil, so er valla nøkur orsøk at halda, at Kyndil ikki skal vinna tann dystin.

Hjá strandingum tykist hinvegin hálvgum svart nú. Heilt lidnir eru teir tó ikki, men nú krevst hjálp - frá Kyndli. Fyrst og fremst, so skulu strandingarnir hugsa um at vinna sínar dystir, sum eru móti VÍF og H71. Enda hesir við sigri, so er treytin hartil hjá strandingum, at Kyndil vinnur seinasta dystin í endaspælinum. Tann dysturin er á heimavølli móti VÍF.

## FAKTA UM DYSTIN

**Kyndil-StÍF 29-22 (13-9)**
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Høgni Klein 9(3), Rókur Akralíð 6, Hans Áki Dal-Christiansen 6(3), Janus Einar Sørensen 3(1), Josef Abrahamsen 2, Hjalti M. Jacobsen 2, Ragnar Stakksund 1
StÍF: Sveinur Justinussen 7, Leivur Justinussen 4(2), Bárður Danielsen 4, Artur Johansen 3(1), Borgar Danielsen 3, BEnt Djurhuus 1
**Brotskøst:** Kyndil 8, StÍF 5
**Útvísingar:** Kyndil 2, StÍF 1
**Dómarar:** Andreas F. Hansen & Eyðun Samuelsen. Einstøk mistøk, men høvdu sum heild gott tak á

## Venjarin var sera nøgdur

Einki er taka seg aftur í, at Kyndils-venjararnir vóru framúr væl nøgdir við tað, sum spælararnir sýndu sunnudagin.

– Vit fáa illa sagt annað. Ikki minst var tað deiligt at síggja, at spælararnir hesa ferð høvdu tamarhald á allan vegin. Seinastu vikurnar hava vit í løtum spælt upp til okkara besta, men í einstøku dystunum hava vit tó sveiggjað ov nógv. Tann trupulleikan høvdu vit ikki hesaferð, og tað var kanska tað besta fyri okkara viðkomandi, sigur Birgir Hansen, sum saman við Kára Nielsen hevur ábyrgdina av liðnum.

### Vilja hava FM í gávu

Birgir dylur heldur ikki fyri, at bæði venjarar og spælarar hava sett sær fyri, at gullið skal vinnast aftur, nú felagið heldur 50 ára føðingardag. Og hann ivast heldur ikki í, at hetta væl og virðiliga kann røkkast.

– Nú hava vit fyrst dystin móti KÍF mikudagin, og hann er kanska tann týdningarmesti av teimum øllum. Tað vil í øllum førum vera ein ordans frammaná, um vit kiksa í hesum dystinum, so tað ræður um at fáa armarnar niður.

– Men eftir tað, so hava vit sera góðar umstøður. Vit hava longri tíð enn hini liðini at venja, og tað ætla vit okkum at gagnnýta. Millum annað við at seta meira ferð á konditionellu venjingina, so spælararnir eru heilt í toppi, tá vit vónandi skulu spæla FM-finalurnar.

– Men fyrst og fremst, so skulu vit altso hugsa um KÍF. Loysa vit ta uppgávuna, kunnu vit byrja at hugsa um alt møguligt annað, sigur Birgir Hansen at enda.

**-mørk**

VÍF-Neistin 31-24 (12-12):

# VÍF greiddi skylduna

**Hóast Neistin argaði nakað, so hevði VÍF ikki teir stóru trupulleikarnar, tá alt kom til alt**

## FAKTA UM DYSTIN

**VÍF-Neistin 31-24 (12-12)**
**Málskjúttar**
**VÍF:** Regin Joensen 7(1), Harald Bjørgvin 6, Rúni Joensen 5(2), Agnar Joensen 4(1), Sámal Joensen 3, John Zachariassen 3, Áki G. Olsen 2, Ingi Olsen 1
**Neistin:** Blagoje Buha 7(1), Áki Mørk 4, Karl Herup Olsen 3, Birgir Poulsen 3(3), Roar Dalsgarð 3, Rani Slættanes 2, Tróndur Kragesteen 2(1)
**Brotskøst:** VÍF 5, Neistin 6
**Útvísingar:** VÍF 4, Neistin 4
**Dómarar:** Rúni Mohr & Ragnar Simonsen.

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá vestmenningar fóru á vøllin sunnudagin, vistu teir sjálvandi ikki, hvussu leikur skuldi fara í hinum dystunum kring landið.

Hjá teimum ráddi um, at gera sín part av arbeiðinum. Og tað gjørdu teir eisini.

Fyri steðgin gekk hetta tó ikki alla tíðina eins væl. Neistin var fyri tað nógva heilt væl við, og tá teir móti endanum av hálvleikinum veruliga fingu ferð, tóktist hetta vera ein strika í rokningini hjá VÍF.

Fyrsta partin av seinni hálvleiki var gongdin eisini hin sama. Eins og dystinum millum liðini bæði í Havn fyrr í vetur megnaði Neistin at fylgja við, men aftur hesa ferð skrædnaði fullkomuliga hjá teimum bláu móti dystarenda.

Vestmenningar, sum hava hópin av royndum spælarum á liðnum, koyrdu alla tíðina sítt spæl, og tá mistøkini frá mótstøðuni gjørdust alt fleiri, beyð ikki bøtur.

Við sigrinum syrgdu vestmenningarnir fyri at gera sín part av arbeiðinum, og sum vera man, so gjørdist lagið ikki verri, tá teir kundu staðfesta, at teir nú eru trý stig undan triða plássinum.

Tað vil við øðrum orðum siga, at megnar VÍF at vinna komandi heimadystin móti StÍF, so hava teir vissað sær pláss í finaluni, áðrenn teir á seinasta leikdegi skulu til Havnar at dystast við Kyndil.

Hinvegin hava vestmenningarnir ofta havt trupulleikar av StÍF. Og megna strandingarnir enn einaferð at seta kílar í, verður spenningurin heilt stórur undan seinasta dystinum. Tá skulu vestmenninar brádliga vinna dystin móti Kyndli, um finaluplássið skal vissast, og tí eru allar súður so langt ífrá syftar enn. Men higar til hevur VÍF gjørt arbeiðið til lítar.